

*Einsamallir uppihaldarar fáa frá 1. september møguleika at søkja um 500 krónur meira at liva fyri um mánaðin*

# 6.000 krónur til einligar mammur

**Reglurnar fyri barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar koma nú í gildi. Fyrsta útgjaldið verður seinast í september mánaði**

BARNAÍSKOYTI
*tíðindaskriv*

Upphæddin er tilsamans 6000 kr. um árið fyri hvørt barnið og verður útgoldin við 1500 kr. hvønn ársfjórðing í forskoti. Fyrsta útgjald verður seinast í september fyri oktober-ársfjórðing 2008.

Fyrri at fáa barnaískoyti, skalt tú ikki liva saman við øðrum vaksnum í hjúnalag ella í hjúnalagslíknandi parlagi. Ert tú gift ella samlivandi, hevur tú sostatt ikki rætt til barnaískoyti.

Barnaískoyti er ætlað barninum og verður útgoldið mammu ella pápa, sum hevur barnið búgvandi hjá sær.

Upphæddin verður javnað hvønn tann 1. januar eftir somu reglum sum aðrar almannaveitingar eftir lóg um áseting og javning av almannaveitingum. Ískoytið er ikki skattskyldugt. Ískoytið verður ikki mótroknað í aðrari veiting, heldur ikki møguligari forsorgarveiting.

Barnaískoytið verður útgoldið fyrstu ferð tann ársfjórðingin, sum kemur aftaná, at rætturin til ískoytið er staðfestur, t.v.s. ársfjórðingin, sum kemur aftaná at barnið er føtt, umsøkjarin er blivin einsamallur, fluttur til landið e.a.

Seinasta útgjald er tann ársfjórðingin, rætturin fellur burtur, t.v.s. tann ársfjórðingin, barnið fyllir 18 ár, móttakarin er blivin samlivandi, flytur av landinum e.a.

Lógarbroytingin, sum gevur rætt til barnaískoyti, er gjørd í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, har ein nýggjur partur 2a (§§ 19a-19f) er skoyttur uppí. Lógin fær gildi 1. sept. 2008.

Umsóknarbløð eru at fáa á økisdeildunujm hjá Almannastovuni, eins og tey kunnu takast niður á heimasíðuni hjá stovninum.

# Sandoyarstevnan 2008 í Húsavík

## Komandi vikuskiftið frá fríggjakvøld til sunnudag

## Skráin:

**Fríggjadagur 11-07-08**

| | |
|---|---|
| Kl. 20.00 | Tivoli letur upp |
| Kl. 20.00 | Matsøla o.a |
| Kl. 20.00 | Karusell fyri børn |
| Kl. 20.00 | 3 ymiskar hoppiborgir |
| Kl. 20.00 | Rodeo tarvurin |
| Kl. 23.00 | Dansur vid Karl Martin Samuelsen Band |

**Leygardagur 12-07-08**

| | |
|---|---|
| Kl 14.00 | Vanja Engskær setur stevnuna |
| Kl 14.30 | Matsøla o.a |
| Kl 14.30 | Tivoli letur upp |
| Kl.14.30 | Karusel, Rodeo tarvurin og hoppiborgir |
| Kl. 14.30-19.00 | Fríða Eystberg Johannusen hevur myndaframsýning í Húsavíkar skúla |
| Kl. 14.30-19.00 | Silja Wendelboe vísir fram tekningar av tekni stílinum Manga |
| Kl. 15.00-24.00 | Matstova verður í Sólarris við Ansgar Nolsøe sum kokkur. |
| Kl.15.00 | Gongutúrur í Húsavík har Hanus undir Leitinum sigur frá søguligum støðum í bygdini |
| Kl. 15.00-19.00 | Ponyríðing á vøllinum. |
| Kl. 16.00 | Undirhald fyri børn: Skattajagt vid Kornelius og Sparius |
| Kl.16.30 | Fríbjørg Jensen syngur |
| Kl.18.30.-21.00 | Konsert við Gurðið Hansdóttir, Martin Joensen og Hanus G. Johansen |
| Kl 24.00 | Felagssangur og midnáttarrøða við Joel Undir Leitinum Aftaná verður dansur við Karl Martin Samuelsen Band |

**Sunnudagur 13-07-08**

| | |
|---|---|
| Kl.12.00 | Guðstænasta við Jákup R. Hansen presti |
| Kl.15..00 | Tivoli letur upp |
| Kl.15.00 | Matsøla o.a. |
| Kl.15.00-16.00 | Meinhard R.Hansen hevur Klaverkonsert í Húsavíkar Skúla Sunleif Rasmussen verður eisini við, sum undirvísari hjá Meinhard |
| Kl.15.00 | Rodeo tarvurin, Karusel, hoppiborgir |
| Kl.15.00 | Ponyríðing |
| Kl.17.00 | Útimøtið við "Útimøtiflokkinum" saman Skopunar missiónshúsið |

**Kostnaður:**
100 kr. fyri børn, alt undirhald er íroknað
200 kr. fyri vaksin, alt undirhald er íroknað, u ttan dansurin við Karl Martin Samulesen Band

## ØLL ERU VÆLKOMIN

Møguleiki er fyri at tjalda

**Sponsor:**
**M/S Eysturbúgvin**